


*- Her er altíð okkurt at práta um – um ikki annað um fiskivinnu ella um gamlar dagar, sigur Torvald Joensen*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# - Herin vit okk

**Í "Torvalds Kaffi" hava menn í Gøtu eitt stað, har teir kunnu hugna sær saman til eitt prát afturvið einum góðum kaffimunni. Kaffið hevur Torvald sjálvandi gjørt.**
**- Hóast vit tosa um so ymisk evni sum fótbólt og politikk ella fiskarí, gongur alt siðiliga fyri seg, sigur 81 ára gamli gøtumaðurin, Torvaldur Joensen.**

UNDIRHÚS
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Gøta:** Klokkan er farin at nærkast trý. Men enn er tann stóra mannfjøldin ikki savnað her í rúminum.

Torvald hevur, sum hann er vanur, longu sett kaffið útá. Løtu seinni er tað liðugt og verður koyrt í termokannuna.

- Tíverri, tit. Í dag eigi eg einki afturvið, bara sukurmolar, sigur hann við umboðini fyri Sosialin.

Annars hevur ikki staðið á at fáa køkur at seta á borðið. Tað er altíð onkur sum kemur við køkum.

Í dag er týsdagur, triði páskadagur, og helst man væl vera etið heima við hús hesa høgtíðina heima við hús.

Spurningurin er, um nakar orkar kaku í dag!

## HB'arar

Tað gongur ein løta aftrat, og nú kemur ein maður inn – tann so kendi vinnulívsmaðurin, Oddfríður Gregersen.

Teir fara allir úr skógvunum, áðrenn teir koma innar í hugnaligа rúmið. Gamlar myndir hanga á vegginum og onkrar bøkur liggja á einum lítlum stovuborði.

Út í gongini standa skógvarnir og á vegginum eru nakrir seymar festir. Her hongur eitt skóhorn, men annars verða seymarnir nýttir at hanga húgvurnar á. Á hurðini er eitt skelti sum boðar frá, at loyvt er ikki at roykja inni í matarhøllini.

Í fundarhølinum er eitt borð, og tað er kring hetta borðið at dagsins evni verða viðgjørd. Her er gott útsýni yvir havnarlagið.

> *Vit hava so nógv at práta um, at vit verða nærum ikki lidnir at práta. Viðhvørt kunnu menn eisini verða rættiliga ivrigir og heitir í prátinum*

Oddfríður fer beinanvegin til termokannuna, skeinkir

# Kaffi til s

**Tað var Torvald sjálvur sum var atvoldin til hetta undirhúsið í Gøtu. Hetta hendi í roynd og veru uttan at hann sjálvur ætlaði tað júst soleiðis.**

KAFFI
*Snorri Brend*

Torvald hevur koyrt mangar túsund kilometrar við millum annað skúlabørnum, men tá hann gavst við hesum, fekk hann arbeiði hjá Harenga í Gøtu.

Hansara virkisøki var at taka sær av maskinunum. Og sunnumorgnar plagdi hann at fara oman á havnarlagið, fyri líkasum at hyggja eftir maskinunum, soleiðis at tær kundu verða klárar til arbeiðstíð dagin eftir.

Fyri honum var hetta eitt ábyrgdarfult arbeiði, sum skuldi gerast 100%. Tað var